## 25 ár við ABS



Longu í 1936 fekk týska Bosch fyritøkan patent uppá eina skipan við blokeringsfríum bremsum, men ikki fyrr enn í 1978 komu fyrstu ABS blokeringsfríu bremsurnar. Frá miðskeiðis í 2004 skulu allir bilar, sum verða seldir í Evropa hava ABS bremsuskipan sum standard

*Kelda: Motor Magasinet*

## Touareg í Danmark



Frá donsku fyritøkuni Semler-Gruppen, sum m.a. innflyta VW bilar, verður sagt, at teir hava millum 250-300 VW Touareg í ordra, men verksmiðjan klárar ikki stóra eftirspurningin.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Selur bilar á netinum



Stóra týska vøruhúsketan Quelle, við sínum umleið 5000 handlum, selur nú bilar bæði í príslistanum og á internetinum. Fyrstu vikuna vórðu seldir meira enn hundrað bilar

*Kelda: Motor Magasinet*

# Nýggjur Volvo S40 sedan



*Nýggi Volvo S40 sedan líkist nógv teimum størru Volvo S60 og S80. Bilurin verður gjørdur á Volvo bilverksmiðjuni í Gent í Belgien*





*Eyðkent og smart Volvo design. Í fyrstu atløgu kemur S40 við 5. syl bensinmotorum har T5 við 220 hk er tann størsti og einum 4 syl. turbodiesel við 136 hk*

**Volvo Car Corporation almannakunngera nú myndir av einum heilt nýggjum Volvo S40 sedan. Bilurin, sum líkist báðum teimum størru Volvo S60 og S80, varð frumsýndur á bilaframsýningini í Frankfurt**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Núverandi Volvo S40, ið hevur verið á marknaðinum síðan 1995, verður nú avloystur av einum heilt nýggjum S40. At síggja til er nýggi S40 ein eyðkendur Volvo. Tað er eisini ætlanin, at bilurin skal verða ein víðari menning av teimum Volvo, sum eru á marknaðinum. Málsetningurin hjá Volvo er sum altíð, at bilurin skal verða tann tryggasti í sínum klassa og verða líka tryggur sum teir størru Volvo. Fýra ymisk sløg av hátrýststáli verða brúkt í berandi konstruktiónini av bilinum sum í einum háteknologiskum samanspæli geva bilføraranum og teimum ferðandi maksimala trygd. Eisini í kabinuni er nógv gjørt burtur úr designi og trygdini.

Í fyrstu atløgu kemur S40 við 5 syl bensinmotorum, har T5 við 220 hk er tann størsti og einum fýra syl. turbo dieselmotori við 136 hk. T5 kann eisini leverast sum 4x4 við elektroniskt stýrdum fýrahjólstrekki.

Nýggi S40 verður gjørdur á Volvo bilverksmiðjuni í Gent í Belgien. Verksmiðjan er nýliga umbygd og nútímansgjørd til endamálið. Framleiðslan er byrjað, og fyrstu bilarnir koma einans til Svøríkis. Aðrir marknaðir fáa bilin fyrst í 2004. Ein annar nýggjur Volvo er ávegis, talan er um V50 stationcar sum kemur á marknaðin fyrra hálvár í 2004.

Nýggi S40 varð frumsýndur á bilaframsýningini í Frankfurt fyrr í hesum mánaðinum.



*Í kabinuni er nógv gjørt burtur úr designi og trygdini*






*Á øðrum túrinum á Føroya Banka eftir ólavsøku fekk Pison 192.000 pund í sjey dagar. Hetta gevur 27.000 pund um dagin! Hendan túrin seldu teir fyri slakar 1,7 milj. krónur*

# Manningin á Pison tjenti 170.000 kr. í tveir mánaðir

**- Skipið hevur havt óvanliga góðan fiskiskap á Føroya Banka, síðan teir fóru út á Bankan at royna eftir ólavsøku, sigur reiðarin, Torleif Sigurðsson**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Línuskipið, Pison í Klaksvík, hevur gjørt fýra roktúrar á Føroya Banka síðan eftir ólavsøku. Samlaða veiðinøgdin hesar túrarnar er 647.000 pund, sum eru seld fyri umleið 5,6 milj. krónur. Miðalprísurin hevur ligið millum 18 og 19 kr. fyri kilo. Hetta gevur ein manningarpart, sum liggur um 170.000 krónur.

Torleif Sigurðsson, reiðari, sigur, at fiskiskapurin hevur verið óvanliga góður.

- Hesar fýra túrarnar hevur skipið fiskað í tilsamans 32 dagar. Tað merkir, at miðalveiðan hevur ligið omanfyri 20.000 pund um dagin – og tað man næstan vera óhoyrt.

Pison fer útaftur á Føroya Banka at royna, har skipið eigur stívliga 20 fiskidagar eftir.

Ætlandi loystu teir aftur í gjár.

### Nógvur toskur

Torleif Sigurðsson sigur, at eini 80% av veiðini hjá Pison hevur verið toskur, og av hesum 80% hava eini 95% verið toskur 1 og toskur 2.

Av øðrum fiskasløgum hava teir fingið nakað av hýsu og havtasku, umframt brosmu og longu.

Tann fyrsta túrin hevði Pison 136.000 pund, tann næsta 192.000, triðja 193.000 og tann fjórða 126.000 pund.

- Tann næsti túrurin var hin besti; tá fiskaðu teir bara í sjey dagar og høvdu eina miðalveiði, sum var 27.000 pund um dagin. Á triðja túrinum, sum var eitt sindur størri í nøgd, fiskaðu teir ein dag meira.

Torleif sigur, at hetta eru alt óvanliga góðir túrar, og tað eru nógv ár síðan, at nakað skip hevur havt so góðan fiskiskap á Føroya Banka.

- Ein stórur partur av veiðini hjá Pison í heyst er løgd upp á Kósini, og reiðarin er væl nøgdur við prísin, teir hava fingið.

Ein partur av veiðini er tó seld á Fiskamarknaðinum.

### Egna við sild

Torleif ivast ikki í, at ein orsøkin til góða fiskiskapin á Bankanum er agnið.

- Størri helmingurin av agninum hevur verið sild, sum Norðborg hevur fiskað og fryst. Hetta hevur víst seg at roynst ógvuliga væl. Hin helmingurin er høgguslokkur.

Reiðarin sigur, at tey skip, sum ikki hava egnt sild, hava ikki havt so góðan fiskiskap á Bankanum sum Pison.

- Sildin er ódrúgvari, men hon er eisini bíligari. Vit keypa høgguslokk fyri 11 kr. fyri kilo og sildina fyri 6 kr. fyri kilo, sigur Torleif Sigurðsson at enda.

Fyri góðum ári síðan kom Pison aftur úr Hirtshals, har skipið hevði verið til umbyggingar fyri 9 milj. krónur.

Alt afturskipið er gjørt av nýggjum, og øll manningin húsast nú har afturi.




**Git og vinn - vinnarin**

Vit takka fyri áhugan tit vístu kappingini á bási okkara á Vørumessuni '03. Í bókahillini vóru 35.143 talmerktar blaðsíður.

365 gittu og av teimum vóru 72, ið gittu eitt tal millum 30.000 og 39.999.

Vinnari gjørdist:

**Kristina Thomsen**
Postverk Føroya
Frímerkjadeildin

...við talinum 35.200, ið var næst rætta talinum. Hon vinnur eitt gávukort uppá 3.000 krónur í bókum frá einum bókahandli.

HESTPRENT
– tí pappír hevur uppiborið tað besta

Tel: 314 555 · Fax: 318 026 · teldupost: hestoy@hestprent.fo